# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Hvør er drongurin?

## Færøernes Mellem- og Realskole



Mynd í sambandi við framsýningin av millum- og realskúlanæmingum hjá Jórunn Dánjalsdóttir, sum verður um ólavsøkumundið í Kommunuskúlanum.

Myndin er tikin umleið 1930 í skúlagarðinum, framman fyri gomlu fimleikarhøllina. Genturnar eru f.v.: Esther Mørk (býr í Kalifornia) og Ebba Kamban (g. Petersen) í Havn. Myndamaður var Hessensmith.

Um onkur kennur drongin á myndini, ella hevur okkurt at viðmerkja í hesum sambandi, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við Jórunn Dánialsdóttir. Adressan er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn, tel. 316024 ella 226024.

*Myndaeigari: Fornminnissavnið*

## Tøkk

Øllum tykkum, sum við gávum, blómum, fjarritum og á annan hátt gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum t. 22. juni 2007, takka vit hjartaliga.

**Helma og Óla Jákup**

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

**Dagurin**

***9. juli.*** Sostrata. Hetta grikska kvinnunavnið er einki kent halgimennisnavn. Dagurin hevur borið ymisk onnur nøvn, men frá árinum 1726 kemur navnið Sostrata í álmanakkarnar.



Fyri 30 árum síðan:

# Maskinmeistarar í 1977

*Tann 29. juni 1977 fingu 21 maskinmeistarar prógv á Maskinskúlanum í Havn. Teir vóru: Jógvan Andreasen, Haldórsvík, Olaf Sigurd Durhuus, Vestmanna, Sverri Jallgrím Heinesen, Skáli, Jógvan Karl Joensen, Klaksvík, Bjartur Johannesen, Vestmanna, Jóannes Johannesen, Tórshavn, John Johannesen, Tórshavn, Magnus Poulsen, Tórshavn, Helgi í Gong Mortensen, Tórshavn, Birgir Livar Magni Hjalt Nicodemussen, Tórshavn, Stig Nielsen, Keypmannahavn, Vilhelm Nielsen, Tórshavn, Julius Olivar Ólavson Nolsøe, Nólsoy, Niels Jákup Hentza á Norði, Keypmannahavn, Annfinn Olsen, Søldarfjørður, Johannes Olsen, Toftir, Gunnar Rubeksen, Tórshavn, Torbjørn Simonsen, Frederiksberg, Egon Jógvanson Øregaard, Fuglafjørður, Svenn Berg, Tórshavn, og Klæmint Skarðhamar, Tórshavn (raðfylgjan er tilvildarlig).*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1977*